tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 06.06.2024 kl. 18:30
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, ~~Alvi Mortensen~~, ~~Jónleyg Jespersen Bech~~, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard

Varalimir: Reidar Simonsen

Ikki møtt: Alvi Mortensen, fráboða, Jónleyg J. Bech ikki møtt

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 34/24 | 24/00157-1 | Tvøroyrar kommuna -Roknskapur 2023 |
| 35/24 | 24/00159-1 | Oyggjaleikir 2027 - bjóða Tvøroyri fram til at hýsa ítróttargreinum |
| 36/24 | 21/00588-41 | Nýgerð av spæliplássi í Froðba |
| 37/24 | 24/00047-2 | Tvøroyrar skúli -Umsókn um játtan til keyp av teldum 2024 |
| 38/24 | 23/00096-4 | Sparkivøllurin í Trongisvági - umvæling |
| 39/24 | 22/00082-2 | Vinabýir -Kujalleq Kommuna í Grønlandi |
| 40/24 | 24/00095-3 | Kongavitjan 2024 |
| **Til kunningar** | | |
| 14/24 | 24/00004-1 | Skattatøl 2024 |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri kunnar um, at Alvi Mortensen hevur fráboða, at hann ikki kann møta til fundin í dag.

Kommunustjórin hevur eftir áheitan av borgarstjóranum innkallað Reidar Simonsen, ið er triði (3) valdi tiltakslimurin á lista “F” Felagslistanum til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 at møta til býráðsfundin. Hetta vegna tað at 1 valdi tiltakslimur Jónhild Midjord Nybo ikki fær møtt, og 2 valdi tiltakslimur Mina Joensen ikki fær møtt

Kristin Michelsen boðar frá, at Reidar Simonsen hevur frammanundan havt sæti í býráðnum, og tekur sostatt sæti í býráðnum uttan atkvøðugreiðslu.

Kristin Michelsen lesur skránna og spyr um viðmerkingar. -ongin viðmerking.

Til støðutakan

## 34/24
## 24/00157-1 Tvøroyrar kommuna -Roknskapur 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 35/24 |
| 2 Býráðið | 06.06.2024 | 34/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 30.05.2024**
Borgarstjórin, fíggjarleiðarin og kommunustjórin hava gjøgnumgingið roknskapin fyri Tvøroyrar kommunu 2023, sum er grannskoðaður av Løggilda grannskoðaravirkinum Januar, Óðinshædd 13, 110 Tórshavn.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. apríl 2018, §38, at leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar.

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjar- og rakstraræltan fyri Tvøroyrar kommunu.

---

**Frágreiðing um grannskoðanina**

**Niðurstøða av framdu grannskoðanini – grannskoðanarátekning**
5. Grannskoðanin av ársfrásøgnini hevur ikki givið orsøk til atfinningarsamar viðmerkingar. Um so er, at kommunustýrið góðkennir ársroknskapin í verandi líki, geva vit honum eina grannskoðanar-átekning uttan tillagingar og áherðslur.

Harumframt hava vit í samsvari við § 10, stk. 7, í kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.tíl. kannað eftir, at upplýstu tølini til Fíggjarmálaráðið fyri tey einstøku tíðarskeiðini samsvara við bókhaldið hjá kommununi, og hava vit gjørt eina átekning uttan vissu í hesum sambandi.

6. Grannskoðanin er farin fram í mai-juni 2024. Allir postar eru gjøgnumgingnir.

**Samanbering av roknskapi við fíggjarætlan og fíggjarliga gongdin**
Í sambandi við grannskoðanina er hugt eftir gongdini í bæði rakstri og løgum í 2023. Niðanfyri er ein talva, sum líkist høvuðsyvirlitinum í ársroknskapinum, sum vísir netto gongdina í 2023. Tølini í talvuni niðanfyri eru netto tøl og ikki brutto tøl.

9. Í fíggjarætlanini fyri 2023 varð roknað við einum halli á 18.551 tkr. Ætlanin var at niðurrinda skuld við 3.377 tkr., og at aðrar fíggjarbroytingar vóru á 15.174 tkr. Netto gevur hetta 18.551 tkr.

Ársroknskapurin vísir eitt yvirskot á 1.201 tkr. Hetta gevur ein nettomun millum fíggjarætlan og roknskap á 19.752 tkr. Niðanfyri er útgreining “268” av, hvussu hesin munur er nýttur:

| Grein | Rakstur (tkr.) | FÆ2023 | R2023 | Frávik 2023 | R2022 | R2021 | R2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1. | Kommunal fyrisiting | 10.640 | 9.925 | 715 | 9.707 | 9.822 | 9.118 |
| § 2. | Almanna- og heilsumál | 30.443 | 30.858 | -415 | 29.674 | 29.168 | 28.094 |
| § 3. | Børn og ung | 15.705 | 14.742 | 963 | 14.423 | 11.678 | 11.238 |
| § 4. | Undirvísing | 8.795 | 8.027 | 768 | 7.326 | 6.749 | 6.647 |
| § 5. | Mentan og frítíð | 9.802 | 8.787 | 1.015 | 7.948 | 8.700 | 10.212 |
| § 6. | Teknisk mál | 7.108 | 5.697 | 1.411 | 5.019 | 4.273 | 3.792 |
| § 7. | Kommunal virki | 3.691 | 3.374 | 317 | 2.153 | 2.191 | 1.303 |
| | Rakstur tilsamans | 86.183 | 81.410 | 4.773 | 76.250 | 72.581 | 70.404 |

| Grein | Íløgur (tkr.) | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1. | Kommunal fyrisiting | 335 | 287 | 48 | 559 | 284 | 377 |
| § 2. | Almanna- og heilsumál | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| § 3. | Børn og ung | 2.100 | 460 | 1.640 | 1.225 | 1.416 | 3.744 |
| § 4. | Undirvísing | 2.995 | 1.461 | 1.534 | 3.275 | 1.226 | 1.621 |
| § 5. | Mentan og frítíð | 5.295 | 4.568 | 727 | 44 | 366 | 80 |
| § 6. | Teknisk mál | 9.835 | 5.732 | 4.103 | 11.682 | 12.424 | 5.210 |
| § 7. | Kommunal virki | 4.855 | 3.702 | 1.153 | 6.121 | 2.103 | 3.274 |
| | Løgur tilsamans | 25.415 | 16.210 | 9.205 | 22.907 | 17.819 | 14.306 |
| Rakstur og løgur tilsamans | | 111.598 | 97.620 | 13.978 | 99.157 | 90.400 | 84.710 |
| §20 | Inntøkur | -93.047 | -98.821 | -5.774 | -96.853 | -91.366 | -89.216 |
| RLÚ (Rakstur, løga og útlán) | | 18.551 | -1.201 | 19.752 | 2.303 | -966 | -4.506 |

**Broytingin er nýtt soleiðis**:

| | |
|---|---|
| Broyting í áogn, peningi og aðrari skuld | 12.456 |
| Broyting í lániskuld | 297 |
| Broyting í gjaldføri | 7.000 |
| | 19.752 |

**Játtan og nýtsla:**

10. Vísandi til høvuðsyvirlitið í ársroknskapinum fyri 2023 hjá Tvøroyrar kommunu og yvirlitið omanfyri, er netto meirnýtsla staðfest á einari grein. Flestu greinir hava minninýtslu í mun til ætlanina. Meirnýtsla er staðfest í Almanna- og heilsumálum. Talan er um 415 tkr. Í løgunum er ongin meirnýtsla staðfest. Í inntøkunum er staðfest ein meirinntøka á 5.774 tkr.

*Vart verður gjørt við, at um peningur skal nýtast út yvir játtan, so skal hetta viðgerast av fíggjarnevnd og býráði, áðrenn peningurin verður brúktur.*

**Fíggjarliga gongdin:**

11. Samlaði raksturin hjá kommununi er í 2023, kr. 81,41 mió, og er nakað væl hægri enn undanfarna ár, tá hann var kr .76,250 mió. Hækkingin er á 6,8%. Samlaðu inntøkurnar hjá kommununi eru á kr. 101,5 mió, sum er nakað hægri enn undanfarna ár, tá tær vóru kr. 96,85 mió.

Á løgusíðuni hevur kommunan nýtt kr. 16,21 mió, samanborið við kr.22,9 mió í 2022. Størstu løgurnar hava verið gjørdar á hesum økjunum: Fólkaskúlin kr. 1,461 mió, nýtt graslíkið kr. 4,36 mió, umsiting og røkt av fastognum kr. 1,727 mió, vegir kr. 6,115 mió, og havnir og lendingar kr. 3,618 mió.

**Útjavningarkonta**

23 Útjavningarkontan primo er avstemmað við ársroknskapin fyri 2022.

**Samlað skuld í mun til álíkning:**

26. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir nettoskuld í mun til álíkning:

| Gongd útjavningarkonto/nettoskuld og lániloft árini 2019 - 2023 | 2023 | 2022 | 2021 | 2020 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Útjavningarkonto/nettosskuld*** | ***36.955*** | ***38.156*** | ***35.850*** | ***36.815*** | ***40.541*** |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | | | | | |
| Kommunuskattur inntøka | 72.935 | 71.223 | 67.967 | 65.571 | 63.053 |
| Kommunuskatta % | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 21,90% |
| ***Álíkning umroknað 23%*** | ***80.263*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** | ***66.220*** |
| Skattur eftirlønargjald | 21.049 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Afturbering DIS, FAS o.a. | 4.895 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | ***106.207*** | ***78.379*** | ***74.796*** | ***72.159*** | ***66.220*** |
| ***Nettoskuld %*** | ***35%*** | ***49%*** | ***48%*** | ***51%*** | ***61%*** |
| ***Lánimøguleikar*** | **69.253** | **40.224** | **38.946** | **35.344** | ***25.679*** |

*Álíknaður skattur og nettoskuld eru roknað út eftir leiðreglum hjá Fíggjarmálaráðnum. Í 2023 eru reglurnar viðvíkjandi útrokning av nettoskuld í mun til álíkning broyttar, soleiðis at frameftir eisini verður tikið hædd fyri tí, sum kommunan fær viðvíkjandi skatti av eftirlønargjøldum og afturbering av DIS, FAS o.a. Nettoskuldin í mun til álíkning er við árslok 2023 35% av einari álíkning. Lánimøguleikarnir hjá kommununi eru tískil við árslok 2023 umleið 69 mió. kr.*

*27. Okkara gjøgnumgongd vísti, at økini vóru í lagi, og hava vit ikki aðrar viðmerkingar enn tær, sum undir punktunum 23 til 26 eru lýstar.*

**Skattainntøkur**

28. Skattainntøkurnar eru gjøgnumgingnar, og tær samsvara við uppgerð frá Føroya Gjaldstovu. Niðanfyri er eitt yvirlit yvir inntøkurnar síðstu 5 árini:

| *(1.000 kr.)* | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|
| Roknskapur | 75.556 | 74.256 | 70.020 | 68.315 | 67.023 |
| Ætlan | 70.469 | 65.581 | 64.380 | 61.572 | 66.119 |
| Munur | 5.087 | 8.675 | 5.640 | 6.743 | 904 |
| Skattaprosent | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 20,90% | 21,90% |
| | | | | | |
| Manntal | 1.747 | 1.767 | 1.771 | 1.747 | 1.714 |
| Inntøka pr. fólk | 43,2 | 42 | 39,5 | 39,1 | 39,1 |
| | | | | | |
| Inntøka umroknað til skattskyldug | 361.512 | 355.292 | 335.024 | 326.866 | 306.041 |
| Inntøka pr. fólk | 207 | 201 | 189 | 187 | 179 |
| Broyting í árinum | 2,92% | 6,29% | 1,11% | 4,79% | -1,46% |

**Íløgur**

31. Tvøroyrar kommuna hevur gjørt íløgur á tkr. 16.210 í árinum, og vísa vit í talvuni omanfyri “268” hvar hesar íløgur eru gjørdar.

**Bú- og Heimatænastan**

33. Í sambandi við grannskoðanina av 2023 er staðfest, at endaligur ársroknskapur fyri 2023 fyriliggur fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy. Sambært roknskapinum er kostnaðurin hjá Tvøroyrar kommunu fyri 2023 hjá Bú- og Heimatænastuni 24.843 tkr. Í fíggjarætlanini fyri 2023 vóru avsettar 23.497 tkr.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

1. Vísandi til § 46 í kommunustýrislógini verður roknskapur og grannskoðanarprotokoll løgd fyri fíggjarnevndina at góðkenna. *Um fíggjarnevndin ongar viðmerkingar hevur, beinir nevndin roknskapin og protokollina í býráðið at viðgera/góðkenna.*

2. Býráðið skal eisini taka støðu til val av grannskoðara fyri ár 2024.
   Greinin er soljóðandi: *“Í samband við góðkenning av ársroknskapinum skal kommunustýrið taka støðu til, um grannskoðarin skal halda áfram, ella um ein annar skal verða valdur. Stk. 2. Til tess at loysa grannskoðaran úr starvi krevst loyvi frá landsstýrismanninum”*

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**

Fíggjarnevndin mælir einmælt til at samtykkja roknskapin fyri 2023 sum fyriliggjandi, og at verandi grandskoðarin heldur áfram. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 06. juni 2024:**

Einmælt samtykt roknskapin fyri 2023, og at verandi løggilda grannskoðaravirkið Januar heldur áfram at grandskoða roknskapin hjá Tvøroyrar Kommunu.

**35/24**
**24/00159-1 Oyggjaleikir 2027 - bjóða Tvøroyri fram til at hýsa ítróttargreinum**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 22.05.2024 | 34/24 |
| 2 Býráðið | 06.06.2024 | 35/24 |

**Málslýsing:**
Oyggjaleikir 2027 verða í Føroyum.

"Við fleiri enn 3.000 íðkarum, umframt hjálparfólkum og áskoðarum, eru Oyggjaleikir nógv tað størsta einstaka ítróttarliga tiltak í Føroyum nakrantíð. At vera vertir fyri Oyggjaleikunum hevur fyrst og fremst stóran týdning ítróttarliga, men eisini fyri okkara ferðavinnu og fyri Føroyar sum land" - løgmaður

Seinastu Oyggjaleikir vóru í summar á Guernsey. Kappast bleiv í 14 ítróttagreinum. Fleiri enn 2.500 luttkarar frá 24 oyggjum luttóku á Leikunum.
Komandi Oyggjaleikir verða í Orkney í 2025. Eftir Oyggjaleikirnar í Føroyum í 2027, verða Isle of Man vertir í 2029.
Fleiri upplýsingar kunnu fáast umvegis Petur Mittún, aðalskrivara í ÍSF, á fartelefon 218284.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
??

**Tilmælið:**
Skotið verður upp at senda áheitan til oyggjaleika-nevndina um, at bjóða Tvøroyri fram til at hýsa ítróttargreinum í 2027

**Mentanarnevndin 22. maj 2024:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar Kommuna bjoðar seg fram til hýsa ítróttargreinir í sambandi við oyggjaleikirnir í 2027. Kommunan sendir eina formella áheitan til oyggjaleika-nevndina og ISF hesum viðv., og bjóðar teimum suður at kunna seg um umstøðurnar.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini, at Tvøroyrar Kommuna bjoðar seg fram til hýsa ítróttargreinir í sambandi við oyggjaleikirnir í 2027. Kommunan sendir eina formella áheitan til oyggjaleikanevndina og ÍSF hesum viðv., og bjóðar teimum suður at kunna seg um góðu umstøðurnar í Tvøroyrar kommunu at skipa fyri ítrótti.

**36/24**
**21/00588-41 Nýgerð av spæliplássi í Froðba**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 15.09.2022 | 25/22 |
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 17.10.2022 | 11/22 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 19.04.2023 | 14/23 |
| 4 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 20.10.2023 | 31/23 |
| 5 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 17.01.2024 | 6/24 |
| 6 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 08.02.2024 | 13/24 |
| 7 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 11.03.2024 | 20/24 |
| 8 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 17.04.2024 | 24/24 |
| 9 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 32/24 |
| 10 Býráðið | 06.05.2024 | 28/24 |
| 11 Býráðið | 06.06.2024 | 36/24 |

**Málslýsing:**
Útgrevstur er byrjaður.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Útgrevsturin er ikki við í tilboðnum frá Arta.
Verður mett at kosta uml. 100.000 kr

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 15. september 2022:**
Nevndin er kunnað um at útgrevstur er byrjaður í Froðba.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. oktober 2022:**
Nevndin er kunnað um at graviarbeiðið er liðugt, og at vit hava fingið rokning áljóðandi 158.000 kr. v/MVG

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 19. april 2023:**
Nevndin er kunnað um, at spæliplássið er samlað á Hjalla, og klárt at senda til økið,  men Arta er eitt sindur afturúr í tíðarætlanini vegna verður.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. oktober 2023:**
Nevndin er kunnað um, at arbeiðið er í gongd.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. januar 2024:**
Tekniska deild innheintar prís uppá fallundirlag í Froðba, so at eykajáttan at samtykkjast.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 08. februar 2024:**
Nevndin er kunnað um avtala er gjørd við lokalan veitara um at arbeiða víðari við málinum.
Arbeiðið krevur, at tað uml. 10 hitastig.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 11. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunna, nevndin ynskir eisini tilboð uppá fallundirlag av gummi granulat til alt økið.
Málið verður tikið upp á einum seinni fundi.

**Tekniska 16-04-2024**
Mælt verður til at taka av tilboð uppá fallundirlag frá JSS / Arctic Import áljóðandi 211.592,30 u/MVG.
Harafturat skulu keypast betongflisar, og arbeiðið skal útinnast.
Í FÆ24 er eingin játtan til endamálið.
Mett verður, at tað er neyðugt at fáa eina eykajáttan uppá 450.000 kr

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 17. april 2024:**
Samtykt at mæla til at fáa eina eykajáttan uppá 450.000 kr, og at seta gongd í arbeiðið skjótast gjørligt.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndini, og at fíggjingin verður veitt av játtan §619. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá Trivnaðar- og umhvørvisnevndin og fíggjarnevndini at veita eykajáttan á kr. 450.000,- av §619 til liðuggerð av spæliplássinum í Froðba.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð, at veita eykajáttan á kr. 450.000,- av §619 til liðuggerð av spæliplássinum í Froðba

**37/24**
**24/00047-2 Tvøroyrar skúli -Umsókn um játtan til keyp av teldum 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 19.02.2024 | 7/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 16/24 |
| 3 Mentanarnevndin | 11.03.2024 | 16/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 17/24 |
| 5 Býráðið | 25.03.2024 | 17/24 |
| 6 Mentanarnevndin | 22.04.2024 | 23/24 |
| 7 Býráðið | 06.05.2024 | 20/24 |
| 8 Býráðið | 06.06.2024 | 37/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 09.02.2024**
Tilmælið frá skúla stjóranum, Jón Johannesen um at dagføra Tvøroyrar Skúla við keyp av teldum.

Skúlastjórin upplýsir at:
Ætlan skúlans er at keypa 40, helst 60 nýggjar farteldur, tí so meta vit, at vit nøkta tørvin her og nú. Upplýst verður at skúlin hevur fingið tilboð uppá keyp av 70 stk. Lenovo ThinkPad T480s (Refurbished) A-Gradei5-8250U 1,60GHz - 8RAM - 256SSD - W11P14" FHD fyri kr. 165.200,- ex. MVG.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ 2024, §411 íløgur skúlin er ongin játtan avsett til teldur.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 19. februar 2024:**
Einmælt samtykt at ganga umsóknini hjá skúlastjóranum á møti at keypt verður 60 teldur, samb. viðlagda tilboð. Mælt verður til at fíggja hetta av §411 (húsavørður) -Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Fíggjarnevndin mælir einmælt til, at umsitingin heitur á skúlaleiðsluna um eisini at innheinta tilboð frá øðrum veitara. Málið verður beint aftur í mentanarnevndina.

**Kommunustjórin 10.03.2024:**

Skúlaleiðslan hevur nú umbiði tvey sambærlig tilboð frá tveimum veitarum, har tað lægra tilboði ljóðar á 70. stk teldur fyri kr. 150.500,-, meðan hægra tilboði er 70. stk teldur fyri kr. 165.200,-, báðir prísir eru ex. mvg. Ongin játtan er avsett á FÆ2024 til hesa íløgu. Mælt verður til, at hetta verður fíggja av §411 "íløga skúli", annaðhvørt við eykajáttan ella við at flytan av játtan.

**<u>Mentanarnevndin 11. marts 2024:</u>**
Mentanarnevndin mælir einmælt til at taka av lægra tilboðnum. -málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Mælt verður til, at keypið verður fíggja av grein §411.

**<u>Fíggjarnevndin 14. marts 2024:</u>**
Borgarstjórin mælir til, at umsitingin heitur á skúlastjóran um tilmælið til hvørjar teldur eru best egnaðar til skúlan, og málið verður lagt fyri komandi býráðsfund. -einmælt samtykt

**<u>Býráðið 25. marts 2024:</u>**
Bjarni Hammer form. í mentanarnevndini mælir til at útseta málið til ein seinni fund. -einmælt samtykt

**<u>Kommunustjórin 11. apríl 2024:</u>**
Skúlastjórin hevur við telduposti dagf. 5. apríl til umsitingina gjørt vart við, at skúlin hevur skund tørv á teldum.
Skúlastjórin skrivar m.a. at:

> *Í løtuni hava vit um 50 teldur úti á Tvøroyri, ið virka hampiliga. Av teimum verða um 20 nýttar á serøkinum. T.v.s. 120 næmingar deilast um 30 teldur. Í Trongisvági eru 20 vælvirkandi teldur til gott og væl 80 næmingar. hetta er als ikki nøktandi. Síðst í mai-mánaði hava vit endaligu próvtøkuna hjá 9. og 10.fl., og tá hevði verið gott at havt nýggjar vælvirkandi teldur til næmingarnar. Vit hava søkt um keyp av 70 teldum, hetta kann deilast upp, so vit keypa helvtina nú og helvtina seinni í ár. Sum sagt er hetta ein vinarlig áheitan á TVK, og vónandi skilja tit okkara støðu hesum viðvíkjandi.*

Kommunustjórin hevur tískil hin 6. apríl heitt á borgarstjóran um at viðgerða málið sum skund mál -*samb. løgtingslóg um kommunustýri §21, stk. 3. har ásett er, at borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva*-. Kommunustjórin hevur tessvegna mælt borgarstjóranum til at játta og heimila skúlanum at keypa 35 stk. teldur beinanvegin samb. tilboð, ið er ynskið og tilmælið hjá skúlastjóranum.

Borgarstjórin hevur tikið avgerð 8. apríl, og hevur játtar og heimila skúlanum at bíleggja 35 teldur samb. tilboð, og verður støða tikin til írestandi keyp seinni.

Til støðutakan er játtan og keyp av teldum til skúlan. Mælt verður til, at allar teldur verða fíggjaðar av §411 "íløga skúli", annaðhvørt við eykajáttan ella við at flytan av játtan.

**<u>Mentanarnevndin 22. april 2024:</u>**
Nevndin er kunna um avgerðina hjá borgarstjóranum at keypa fyribils 35 teldur.
Nevndin mælir einmælt til at írestandi 35 teldur verða keyptar samb. tilmælið hjá skúlastjóranum.

**<u>Býráðið 06. maj 2024:</u>**
Borgarstjórin mælir til at býráðið samtykkir tilmælið hjá mentanarnevndini at játta skúlanum at keypa 70 stk. teldur, ið verða játtaðar av §411, íløgur til skúlan. -Einmælt samtykt.

**<u>Býráðið 06. juni 2024:</u>**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð, at játta skúlanum at keypa 70 stk. teldur, ið verða játtaðar av §411, íløgur til skúlan.

**38/24**
**23/00096-4 Sparkivøllurin í Trongisvági - umvæling**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 33/24 |
| 2 Býráðið | 06.05.2024 | 29/24 |
| 3 Mentanarnevndin | 22.05.2024 | 30/24 |
| 4 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 36/24 |
| 5 Býráðið | 06.06.2024 | 38/24 |

**Málslýsing:**
Gamla graslíkisvøllurin í sparkivøllinum í Trongisvági er tikin burtur orsakað av dálking.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
uml. 200.000 kr

**Tilmælið:**
Mælt verður til at útvega eykajáttan til at leggja graslíki á vøllin – ein meting frá Idémøblum sigur 170.000 kr. Sostatt er tað ynskiligt at fáa ein fíggjarkarm áljóðandi 200.000 kr.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað, og tekur fíggjarnevndin undir við ætlanini. Málið verður beint í mentanarnevndini.

**Býráðið 06. maj 2024:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at málið verður beint í mentanarnevndina. -**Einmælt samtykt.**

**Mentanarnevndin 22. maj 2024:**
Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá Idé Møblum, áljóðandi 169.000 kr u/MVG.
Mint verður á at fáa stoypt garðin omanfyri, soleiðis tilfar ikki kemur inn á vøllin.

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini, og at játtanin verður veitt við eykajáttan til §411 «Íløga skúlin». Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Eimælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini. -málið skal hava tvinnar viðgerðir.

**39/24**
**22/00082-2 Vinabýir -Kujalleq Kommuna í Grønlandi**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 03.02.2022 | 3/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 21/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 37/24 |
| 4 Býráðið | 06.06.2024 | 39/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 31.01.2022**
Fyrisp/ynskið er komið frá Kujalleq um vinarbýiar samstarv, og er ætlanin at umboð úr Kujalleq vitja í Føroyrum í april/mai. 2022.

**Lógargrundarlag:** Kommunufultrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** Okent

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 03. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.
Einmælt samtykt at taka av innbjóðingini um vinarbýar samstarv við Kujalleq kommune.

**Kommunustjórin 17.02.2022**
Kujalleq kommune hevur fráboða at tey ikki koma á vitjan í apríl/mai, menn seinni í ár.
Uppskot verður lagt til støðutakan hvørt Tvøroyrar býráð, ístaðin skal fara á vitjanarferð í Kujalleq kommune í mai, juni, juli 2022

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Einmælt samtykt at umsitingin kannar nærri um hetta letur seg gera, og ger eina kostnaðarmeting fyri ferðina. Málið verður lagt fyri býráðið.

**Kommunustjórin 24.05.2024:**
Borgarstjórin í Kommunu Kujalleq Stine Egede, Simon Simonsen, kommunalbestyrelsessedlem, Tine Pars, kommunaldirektør og Sten Lund, erhvervssekretrær vitja Tvøroyrar kommunu leygardagin 25. mai.

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**40/24**
**24/00095-3 Kongavitjan 2024**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 38/24 |
| 2 Býráðið | 06.06.2024 | 40/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 24.05.2024**
Tvøroyrar kommuna fær vitjan av Fríðriki kongi og Mary drotning 13. juni 2024, og verður Tvøroyrar Kommuna í hesum sambandi vertur fyri hátíðarveitslu í SALT á Drelnes kl. 19.00.

Skráin fyri vitjanina er, at Kongshjúnini vitjar í barnagarðinum Mýrifípuni, haðani fari verður vestur í plantaguna, har tey planta eitt træ í samband við at plantagan fyllir 100 ár í 2024.

Kongaskipið Dannebrog liggur við bryggju á Drelnes, haðani tað fer frá bryggju við kongsparinum kl. 22.00.

**Lógargrundarlag:**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Mælt verður til at fíggja vitjanini sum eykajáttan til §114, umboðan**.**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað -Fíggjarnevndin mælir til at vitjanin verður fíggja við eykajáttan §115 íløgur í fyrisiting. Málið verður beint í býráðið eftir at greitt er, nær Kongavitjanin verður.

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað, einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini og málið verður tikið upp til nýggja viðgerð á einum seinnum fundi.

**Til kunningar**

## 14/24
## 24/00004-1 Skattatøl 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2024 | 2/24 |
| 2 Býráðið | 29.02.2024 | 4/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2024 | 5/24 |
| 4 Býráðið | 25.03.2024 | 9/24 |
| 5 Fíggjarnevndin | 03.05.2024 | 8/24 |
| 6 Býráðið | 06.05.2024 | 13/24 |
| 7 Fíggjarnevndin | 06.06.2024 | 9/24 |
| 8 Býráðið | 06.06.2024 | 14/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2024**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2023/2024

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2024/2025

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 29. februar 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 14. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 25. marts 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 03. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. maj 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 06. juni 2024:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 19:30

________________________________

Kristin Michelsen

________________________________

Anita Vibergsdóttir

________________________________

Reidar Simonsen

________________________________

~~Jónleyg Jespersen Bech~~

________________________________

Bjarni Hammer

________________________________

Kristina Roest

________________________________

Eyð Jóna Eidesgaard